# ítróttur

Nr. 232 • fríggjadagur • 3. desember 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

## Jón Rói nýggjan sáttmála

Heimasíðan, www.bold.dk, skrivar nú, at Jón Rói Jacobsen hevur longt sáttmálan hjá sær við Frem.

Upprunaliga var talan um eitt ára sáttmála, har felagið helst eisini vildi staðfesta, hvørt føroyski landsliðsleikarin av álvara skuldi vinna á álvarsliga skaðanum, sum hann fekk í fjør.

Hetta tykist nú vera staðfest, og Jón Rói hevur nú fingið nýggjan tvey ára sáttmála, sum gongur fram til summarið 2005.

-jm

## Lutakast hjá yngru landsliðunum

Lutakast hevur verið til EM-undankappingarnar hjá føroysku U17 og U19 landsliðunum hjá dreingjum. Ikki kann sigast, enn at serliga U17-landsliðið av álvara sleppur at royna seg. Teir eru komnir í bólk saman við so sterkum tjóðum sum Týsklandi og Portugal, men møguleiki eigur eisini at verða fyri stigum, tí fjórða landið í bólkinum er San Marino.

U19-landsliðið er komið í bólk saman við Belgia, Svøríki og Ungarn. Tá ið U19-kapping var í Føroyum fyrr í heyst, vóru føroyingarnir eisini í bólki saman við Ungarn, sum tá vann bólkin.

-tn

Tjaldur-Neistin 16-39

# Neistin á odda



*Har var eingin ivi, tá Neistin vitjaði Tjaldur mikukvøldið*

**Eftir trivaliga sigurin á Tjaldri hava Neista-kvinnurnar – fyribils í øllum førum – lagt seg á odda**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*

Tað var ikki tað stóra at tosa um, tá Neistin mikukvøldið vitjaðu í Runavík. Stigatalvan tosaði longu undan dystinum sítt týðuliga mál um støðuna hjá liðunum báðum, og á vøllinum var so heldur ikki tann stóri ivin.

Frá fyrsta bríksli byrjaði Neistin at toga frá, og so gekk tað bara ein vegin.

Sigurin ber við sær, at Neistin nú hevur lagt seg á odda í bestu kvinnudeildini. Saman við VB og Stjørnuni hava tær bláu úr Havn nú 12 stig, men Neistin hevur so leikt ávíkavist ein og tveir dysir fleiri enn hini bæði oddaliðini.

Fram til 11. desember verður tað tó eingin, sum tekur tær bláu, tí kvinnurnar skulu nevnliga hugsa um steypa- og ikki landskapping komandi vikuskiftið. Um hálva aðru viku verður talan tó um munandi truplari uppgávu hjá Neistanum. Tá verður tað nevnliga VB, sum er mótstøðuliðið.

Tíverri hava vit ikki fingið nakran dómaraseðil frá dystinum.

### Sunset-kappingin

| | dystir | v | j | t | v. mál | t. mál | m.-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Neistin | 8 | 6 | 0 | 2 | 251 | 174 | 77 | 12 |
| 2 VB | 7 | 6 | 0 | 1 | 214 | 142 | 72 | 12 |
| 3 Stjørnan | 6 | 6 | 0 | 0 | 163 | 123 | 40 | 12 |
| 4 Søljan | 8 | 4 | 0 | 4 | 223 | 198 | 25 | 8 |
| 5 VÍF | 8 | 4 | 0 | 4 | 187 | 186 | 1 | 8 |
| 6 StÍF | 7 | 1 | 1 | 5 | 150 | 186 | -36 | 3 |
| 7 Kyndil | 7 | 1 | 1 | 5 | 131 | 192 | -61 | 3 |
| 8 Tjaldur | 7 | 0 | 0 | 7 | 135 | 253 | -118 | 0 |




Toyota Avensis 1,8 SOL Sedan — 6 mánaða garanti
Skrásetingarnr.: GL 814 KM: 117.000
Árgangur: 06-11-00 Seinast sýnaður: 30-04-03
Viðmerking: El rútar - El spegl - Fjarstýrt sentral lás - tokulyktir - Tónaðar rútar aftan - 6 Air bags
Kr. 98.600,-



Toyota Corolla 1,4 sedan — 6 mánaða garanti
Skrásetingarnr.: SM 628 KM: 48.000
Árgangur: 30-10-00 Seinast sýnaður: 23-01-04
Viðmerking: El rútar Framman - El spegl - sentral lás - Fløguspælara - hæddar stilling av førarasetri
Kr. 108.600,-



Skoda Oktavia 1,6 GLX — 6 mánaða garanti
Skrásetingarnr.: GD 930 KM: 61.000
Árgangur: 11-05-00 Seinast sýnaður: 23-03-04
Viðmerking: Sentral lás - AC - El rútar - El spegl.
Kr. 108.600,-



Toyota Avensis 2,0 SOL AUT — 6 mánaða garanti
Skrásetingarnr.: RE 645 KM: 132.000
Árgangur: 09-10-02 Seinast sýnaður: 09-10-02
Viðmerking: El rútar - el spegl - fjarstýrt sentral lás - ABS - VSC - tokulyktir - Fløguspælara - Tónaðar rútar aftan - 6 Air bags
Kr. 178.600,-



Toyota Camry 2,2 GL AUT Sedan — 6 mánaða garanti
Skrásetingarnr.: JU 583 KM: 87.000
Árgangur: 10-02-98 Seinast sýnaður: 05-11-03
Viðmerking: El rútar - El spegl - Sentrallás - Fløguspælara - 4 Air bags - Lyktavaskarar - CruiseControl - Hiti í setrunum - Leður á róðri og á gearknøtti - Toku lyktir - ABS
Kr. 132.600,-



Toyota Yaris 1,0 AUT — 6 mánaða garanti
Skrásetingarnr.: DG 866 KM: 27.000
Árgangur: 30-05-03 Seinast sýnaður: 30-05-03
Viðmerking: El rútar - el spegl - fjarstýrt sentral lás - ABS - Tiptronic gear - fløguspælara
Kr. 135.600,-

Fyrivarni verður tikið fyri møguligum prentvillum.



Mitsubishi Carisima 1,9 DID — 6 mánaða garanti
Skrásetingarnr.: HV 230 KM: 51.000
Árgangur: 19-03-02 Seinast sýnaður: 19-03-02
Viðmerking: El rútar Framman - El spegl - Fjarstýrt sentral lás - Fløguspælara - AC - Hiti í setrum - Cruise Control - Rustviðgjørdur 15-03-02
Kr. 158.600,-



Fiat Stilo 1,6 — 6 mánaða garanti
Skrásetingarnr.: TJ 583 KM: 20.000
Árgangur: 11-07-02 Seinast sýnaður: 11-07-02
Viðmerking: Sentral lás - el rútar - el spegl - fløguspælara - innstilling av fjarðum(City/ASK)
Kr. 149.600,-



Toyota Avensis stw. 2,0 D4-D — 6 mánaða garanti
Skrásetingarnr.: GS 319 KM: 102.000
Árgangur: 04-08-00 Seinast sýnaður: 27-08-03
Viðmerking: El rútar framman - el spegl - Fjarstýrt sentral lás - Fløguspælara
Kr. 138.600,-



Toyota Camry 2,4 GL AUT Sedan — 6 mánaða garanti
Skrásetingarnr.: LF 709 KM: 45.000
Árgangur: 20-12-01 Seinast sýnaður: 20-12-01
Viðmerking: El rútar - El spegl - fjarstýrt sentral lás - Fløguspælara - 6 Air bags - Lykta vaskarar - Cruis Control - Hiti í setrunum - Leður á rætti og á Gearknøtti - Toku lyktir - ABS - TRC
Kr. 265.600,-

6 mánaða garanti

Vit bjóða nú 6 mánaða garanti uppá bilar, ið kosta meira enn 85.000,-
Garanti skipanin, ið hevur eina sjálvsábyrgd uppá kr. 500,-, fevnir um allar knappliga íkomnar feilir, ið eygsæð ikki skyldast nýtslu brúkarans, rust, uttanífrákomnir skaðar ella væntandi tænastueftirlit.
Eingin gandur og eingir smáir bókstavir.
Kom og vitja okkum · landsins fremstu bilasølu.

Vegurin Langi • Hoyvík • Tel. 353040 • Fax 353041
rs@reyniservice.fo • www.reyniservice.fo

REYNI SERVICE P/F